FYLGISKJAL 7

Til Almannamálaráðið
Eirargerður 2
110 Tórshavn

Nólsoy 21. Oktobur 2019

# Hoyringssvar til lógaruppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almannapensjónir v.m.

Heilafelagið takkar fyri at enn verður arbeitt við at betra um umstøðurnar hjá fyritíðarpensjonistum. Nógvir limir í Heilafelagnum hava fyritíðarpensjón sum sítt einasta uppihaldsgrundarlag, tó júst hvussu nógvir limir fáa hægstu, meðal ella lægstu fyritíðarpensjón vita vit ikki.
Omanfyri nevnda lógaruppskot umfatar sostatt eitt ókent tal av limum, men sannlíkindi fyri at limir í Heilafelagnum eru í øllum trimum bólkum er til staðar.

Endamálið við uppskotinum er: **at betra um, at lætta um tilgongdir og at minka um avleiðingar av markamótum**, sum borgarar sum flyta millum londini í danska kongaríkinum koma út fyri. Hetta fegnast vit um, men vegna Heilafelagið vilja vit leggja dent á, at munur skal IKKI vera á borgarum í danska kongaríkinum og vit vilja at limir okkara og øll onnur við fyritíðarpensjón skulu hava javnbjóðis rættindi og umstøður í danska ríkinum. Tað vil siga, at Heilafelagið vil at lógin verður meira ambitiøs og tekur burtur øll markamót á økinum.

Tað eigur ikki at vera truplari at flyta millum lond í danska kongaríkinum enn tað er at flyta millum onnur Norðurlond.
Heilafelagið fegnast um at samstarvað verður vegna borgaran um at flyta skjøl og at umseta skjøl, soleiðis at tað lættir um hjá borgara ið ynskir at flyta millum londini í kongaríkinum.

Heilafelagið vil tó gera vart við, at tað er óheppi at broyta tíðarskeiðið úr 36 mánaðum niður í 12 mánaðir, hetta tí vit ikki eru sannførd um, at ein flyting og viðgerð um tillutan av fyritíðarpensjón í øðrum landi í ríkinum kann avgreiðast innan 12 mánaðir.
Tey sum hava hægstu fyritíðarpensjón flyta beinleiðis yvir í skipanina í tí landi tey flyta til, tað er gott.
Trupulleikarnir stinga seg upp tá talan er um fólk, ið fáa meðal ella lægstu fyritíðarpensjón. Hesi fyribrygdi finnast ikki í Danmark og tey mál vit kenna til, snúgva seg oftast um flyting út Føroym til Danmarkar. Tí er neyðugt at broyta hesa skipan í Føroyum, soleiðis at tey ið

**Heilafelagið**
**Felagið fyri apopleksi - og afasirakt**
**Íslandsvegur 10 c.**
**FO - 100 Tórshavn**
heilaf@olivant.fo

framyvir fáa tillutað fyritíðarpensjón fáa tillutað hægstu fyritíðarpensjón. Tað letur seg ikki gera at uppihalda sær sjálvum við meðal ella lægstu fyritíðarpensjón, tí pengarnir strekkja ikki til at forsyrgja sær og gjalda eitt nú húsaleigu v.m.

Í serligu viðmerkingunum stendur at tey sum fáa meðal og lægstu fyritíðarpensjón framvegis hava 36 mnr. at skaffa sær annað uppihaldsgrundarlag. Hetta meta vit verður trupult og tí eiga føroysku myndugleikarnir at gera broytingar framyvir v.v. hesum pensjónum og at hjálpa hesum borgarum serstakt um tey ynskja at flyta.

Í tekstinum vit hava fingið til hoyringar verður heitið "ríkisfelagsskapur" áhaldandi brúkt, hetta meta vit ikki vera rætt at brúka tá talan er um eitt lógaruppskot. Orðið ríkisfelagsskapur er ikki eitt óheft orð og halda vit ikki at tað hoyrur heima í lógarsmíði. Talan eigur heldur at vera um **londini í danska kongaríkinum ella í ríkinum**.

**Samanumtikið vil Heilafelagið heita á partarnar um:**

- At øll markamót verða tikin burtur og at altjóða sáttmálar verða fylgdir so flytføri verður reelt
- At tryggja øllum fyritíðarpensjonistum javnbjóðis rættindi í danska kongaríkinum
- At tíðarskeiðið ikki verður stytt, men orðað soleiðis at tað hóskar málsviðgerðartíðini
- At viðbøtur í føroysku skipanini fylgja við í viðgerðartíðini
- At skattavðiurskiftini verða greið tá ein flytir millum londini í ríkinum
- At meðal og lægsta fyritíðarpensjón verður endurskoðað
- At tað skal ikki vera truplari at flyta úr Føroyum til Danmarkar enn at flyta úr Danmark til Føroyar sum fyritíðarpensjonistur – sama fyri fyritíðarpensjonistar til/úr Grønlandi
- At orðavalið í uppskotinum verður nevtralt

Vit møta fegin at greiða nærri frá umstøðunum hjá limunum í Heilafelagnum.

Vegna Heilafelagið

Maud Wang Hansen
Forkvinna

**Heilafelagið**
**Felagið fyri apopleksi - og afasirakt**
**Íslandsvegur 10 c.**
**FO - 100 Tórshavn**
heilaf@olivant.fo